# Umhvørvisstuðul – yvirlit yvir stuðulsjáttanir 2010-2025

| Ár | Heiti | Mál | Stuðul | Stuðulsmóttakari |
|---|---|---|---|---|
| 2025 | Inspiratiónsgarður við vakstrartunli í Norðurlandahúsinum | Verkætlanin skal geva íblástur til teirra, sum ætla at dyrka sítt egna grønmeti, urtir ella átuligar blómur. Talan er um ein vakstrartunnil, sum er opin fyri øllum, og eisini ber til at sita í tunlinum og njóta ein góðan kaffimunn og fylgja við hvussu planturnar trívast. | Kr. 10.000 | Norðurlandahúsið |
| 2025 | Láni – trillibørur í Nólsoy | Verkætlanin snýr seg um at prýða átta trillibørur, sum verða settar upp við ferjuleguna og uttanfyri matvørubúðina í Nólsoy. Hetta skal gera tað lættari hjá øllum at flyta matvørur og annað runt í bygdini uttan at noyðast at brúka bilin. | Kr. 20.000 | Vígdis Bjarnadóttir og Ívar Bærentsen |
| 2025 | Ednulundin – Fríøkið norðuri í Stong | Verkætlanin Eydnulundin snýr seg um at byggja nøkur smá gistingarskýli. Á hendan hátt hava vitjandi og smáir bólkar møguleikan at njóta náttúruna á ein øðrvísi og stuttligan hátt. Eisini er ætlanin at planta fleiri trø og at gera eina felagsveltu, sum vitjandi kunnu fáa gleði av. | Kr. 25.000 | Jacoba Juulsdóttir Jacobsen og Margret Rasmussen |
| 2025 | Vakstrarhús | Ein verkætlan, har lærarar og næmingar á Serbreytini á Glasi saman byggja eitt vakstrarhús og saman framleiða og njóta sítt egna grønmeti. | Kr. 40.000 | Sigrid Ragnhild Dam |
| 2025 | Vakstrartunnil á Velbastað | Ætlanin er at byggja ein Polycurb vakstrartunnil, sum gevur fleiri møguleikar at dyrka ymiskt, sum ikki kann vaksa uttandura orsakað av føroyska veðrinum. | Kr. 40.000 | Felagsveltan á Velbastað |
| 2025 | Fríøkið við Krossá | Verkætlanin snýr seg um at gera ein felagsveltu og eina náttúrustøð framvið Krossá, sum allir borgarar í Kaldbak kunnu fáa gleði av. | Kr. 40.000 | Olina Skorá og Súsanna Crooks |
| 2025 | Umhvørvisstøð til túnabúgvar | Verkætlanin snýr seg um at byggja eina lítla skiljistøð til burturkastið við Krossgøtu. Ætlanin er, at skiljistøðin skal verða náttúrupositiv, eitt nú við gróðuri á facadunum. | Kr. 150.000 | Grannar við Krossgøtu |

| Ár | Heiti | Mál | Stuðul | Stuðulsmóttakari |
|---|---|---|---|---|
| 2024 | Altjóða Vatnráðstevna | Ein altjóða ráðstevna, sum Jarðfeingi skipar fyri saman við felagsskapinum IWRA, sum stendur fyri International Water Resources Association. Ráðstevnan verður 4.-6. september 2024. Eitt av høvuðsendamálunum við ráðstevnuni er at gera føroyingar meira tilvitaðar um vatn og ta ofta kostnaðarmiklu og orkukrevjandi viðgerð, vatn krevur frá keldu til vask. | Kr. 20.000 | Jarðfeingi |
| 2024 | Vatn aftur í tjørnina í Gundadali | Verkætlanin snýr seg um at fáa endurskapt tjørnina í Gundadali, ið liggur ovast á Tinghúsvegnum. Ætlanin er at skapa ein vakran blett, at fáa fuglalív aftur í økið og at vaksa um lívfrøðiliga margfeldið í býnum. | Kr. 230.000 | Árni Helmsdal og Høgni Jensen |

| Ár | Heiti | Mál | Stuðul | Stuðulsmóttakari |
|---|---|---|---|---|
| 2023 | Stuttflutt tilfeingi | Ein verkætlan, sum lærir børn og vaksin at gagnnýta stuttflutt tilfeingi. Lítliskúli fer at fáa ein matligan skúlagarð, har ið børnini millum annað fara at gera kompost, velta grønmeti og planta berjarunnar. Hvørja viku hevur Lítliskúli ein útidag, og ætlanin er at brúka onkran av hesum á seiðabergi. Alt tilfeingið verður so brúkt í matarskipanini og í køkundirvísingini á Lítlaskúla. | Kr. 75.000 | Lítliskúli v. Gunvør Hofgaard |
| 2023 | Byggitilfar | Ein verkætlan, sum gevur borgarum møguleikan at keypa og selja byggitilfar á serstakari heimasíðu. Ætlanin er, at borgarar skulu kunna fara inn á heimsíðuna og leita eftir tilfari, teimum manglar, samstundis sum borgarar og fyritøkur eisini kunnu selja avlopstilfar á síðuni. Hugsað verður eisini um byggitilfar, sum stavar frá niðurtøku ella umbyggingum. | Kr. 79.200 | Niels Mellemgaard |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | | Hetta fer vónandi at føra við sær, at meira byggitilfar verður endurnýtt og minni verður innflutt. | | |
| 2023 | Vit flyta okkum nærri einum ruskleysum høvuðsstaði | Ætlanin er at skipa fyri einum stórum ruddingardegi tann 16. september, har ið málið er at fáa 2000 fólk í øllum aldursbólkum, saman við politikarum, at rudda býin. Stuðul verður latin til at framleiða ein stuttfilm, sum skal fáa fólk at steðga á og ásanna, hvussu týdningarmikið tað er, at vit øll gera okkara fyri at halda høvuðsstaðin ruddiligan. | Kr. 47.900 | Rudda Føroyar |
| 2023 | Náttúruráðstevnan 2023 | Ætlanin er at halda eina Náttúruráðstevnu í Norðurlandahúsinum í heyst 2023. Náttúruráðstevnan skal millum annað lýsa, hvat borgarar og fyritøkur kunnu gera fyri at liva og virka meira burðardygt. Ætlanin er at náa so nógvum málbólkum sum møguligt, so har verður okkurt til bæði børn og vaksin. | Kr. 47.900 | FNU |

| **Ár** | **Heiti** | **Mál** | **Stuðul** | **Stuðulsmóttakari** |
|---|---|---|---|---|
| 2022 | Árið og maturin | Ein kalendari/bóklingur, sum er við til at gera borgarar í Tórshavnar kommunu meira tilvitaðar um matin, sum er tøkur í Føroyum. Kalendarin fortelur um rávøruna og framleiðsluna og er tí við til at skapa meira virðing fyri rávøruni og er eisini við til at stimbra einari burðardyggari matframleiðslu og matmentan í Føroyum. | Kr. 25.000 | Sunniva G. Mortensen og Lena Nicolajsen |
| 2022 | Frá lívrunnum burturkasti til fruktagóða mold | Ein verkætlan, ið snýr seg um at gera lívrunnið burturkast til fruktagóða mold til at dyrka grønmeti í. Hendan verkætlan verður partur av undirvísingartilfarinum í skúlanum á Løgmannabreyt og verður eisini almennakunngjørd, soleiðis at aðrir stovnar, skúlar og onnur í Tórshavnar kommunu kunnu fáa gagn av henni. | Kr. 60.000 | Jón Kragesteen og Høgni Joensen |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 2022 | Seiðaberg | Seiðaberg verður staðsett í Nólsoy, og øll kunnu vera við. Útgerð verður á staðnum. Verkætlanin ger tað møguligt hjá borgarum í Tórshavnar kommunu at útvega sær umhvørvisvinarligan, atkomuligan og burðardyggan mat. Við kunning á alnótini fáa fólk frálæru um fiskasløg, hagreiðing og uppskriftir. | Kr. 35.000 | Rebekka Gade og Jógvan Thomsen |
| 2022 | Stóragarðsveltan mennir ein hátt at framleiða sín egna mat | Stóragarðsveltan er ein grannavelta, har 28 húski eru knýtt at veltuni. Endamálið við veltuni er at gera húski før fyri at framleiða sítt egna reina og fríska grønmeti. Verkætlanin byggir á at læra so nógv sum gjørligt um velting, sløg og serlig føroysk viðurskifti og at deila teirra royndir við aðrar býlingar, bygdir og feløg. | Kr. 33.000 | Katrin Petersen |
| 2022 | Fjallalund | Hendan verkætlan er ein fjallalund, sum er gjørd við og av tilfari úr komposteraðum ruski og føroyskum endurfengi av borgarum í Tórshavnar kommunu. Fjallalundin skal verða sjónlig í býarmyndini og allir borgarar í kommununi kunnu verða við. Fjallalundin kann brúkast til framsýningar, undirvísing og læring hjá børnum í øllum aldri. | Kr. 62.000 | Medena Dalsgaard og Annie Heinesen |
| 2022 | Spora.fo | Spora.fo er ein veðurlagsroknimaskina, sum skal gera tað lætt hjá fólki og stovnum at rokna CO2-fótasporini av lutum og gerðum. Spora.fo verður eitt tíðarhóskandi og effektivt amboð til at hjálpa stovnum og borgarum í Tórshavnar kommunu at taka burðardyggar avgerðir í dagligdegnum. | Kr. 35.000 | Rói Dam Dalsgarð |

| **Ár** | **Heiti** | **Mál** | **Stuðul** | **Stuðulsmóttakari** |
|---|---|---|---|---|
| 2021 | Í krukkuna! | Verkstovur um burðardygga matgerð, m.a. niðursjóðing av grønmeti og urtir frá føroyskum bóndum, til tess at fyribyrgja matoyðsl og burturkast í Tórshavnar kommunu umframt at styrkja sambandi millum meginøkið og útoyggjarnar í kommununi | Kr. 60.000 | Sunniva G. Mortensen og Matkovin |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 2021 | Kenneth Williamson Fuglagrunnurin | Menna fuglagrunnin. 2-3 verkætlanir, ið granska árin á fuglalív av burturkasti. Serliga eru tað hevhestur, drunnhvíti og skrápur, sum eru plágaðir av plasti í sjónum, og eru hesir nógvir í tali í Tórshavnar kommunu | Kr. 15.000 | Diana Krossá Kongsbak og Fuglafrøðifelagið |
| 2021 | Planta urtir og átuligar blómur á alment øki í Nólsoy | Minka um unnflutningin og burturkast av útlendskum vørum við at planta fleiri sløg av urtum og átuligum blómum í felags plantukassar í Nólsoy. Stuttfluttur matur er til gagns fyri fólk og umhvørvið, og nú Nólsoy er vetrarfriðað, letur hendan verkætlanin seg gera | Kr. 4.000 | Maud Wang Hansen |
| 2021 | Grøn sankutøð á alment øki í Nólsoy | Byggja kompost úr endurnýtslutilfari (plattum). Fyri at minka um burturkast og til tess at læra at skilja grønt burturkast, gevur tað góða meining at byggja eina felags kompostskipan í Nólsoy. Verkætlanin umfatar eisini eina verkstovu um at skilja burturkast til grønan kompost | Kr. 8000 | Maud Wang Hansen |
| 2021 | Endurnýtsluverkstovur á Dugna: stearin klædnaprent, glas og metal | Amboð og útgerð ísv. endurnútslu av tilfari, sum annars fer burtur. Hetta skal brúkast til meira útvent virksemi, eitt nú: podcast, smáar filmar og verkstovur. Fokus er á stearin, toy, glas og metal m.a. við at brúka kertstubbar at gera nýggj stearinljós, t.d. jólaljós, umseyming av toy umframt at gera vasar burturúr glasi og steintoy, ið annars ikki kann seljast | Kr. 38.000 | Allan Mørkøre og Dugni |
| 2021 | Endurnýtslujólatræ til Nólsoyar bygd | Konstruera eitt jólatræ, sum skal endurnýtast hvørt ár. Skal gerast og pyntast við endurnýts endurnýtslutilfari. Bindiklubbarnir í bygdini og onnur sjálvboðin fara at virka pynt og umvæla hvørt ár. Jólatræið skal koma í staðin fyri granntræið í bygdini. | Kr. 20.000 | Vígdis Bjarnadóttir |
| 2021 | Rudda stubbar | Økja um vitanina og tilvitanina um, hvussu dálkandi sigarettstubbar eru við einari lýsingarherferð við lýsingum til sosialu miðlarnar og í fjølmiðlarnar og við at seta gjøgnumskygd rør upp ymsastaðni í býnum í ein mánað í summar. Rørini verða eftir ætlan sett upp á Skálatrøð, í Steinatúni, við SMS, við Glasir, við trappuna í Vágsbotni og nærindis Áarstovu og Essabarr. | 50.000 | Sigrun Mohr og Rudda Føroyar |
| 2021 | Gløggpløgg og Skrøggpløgg - skapandi klædnapakkar til børn | Selja barnapakkarnar 'Gløggpløgg' og 'Skrøggpløgg', ið innihalda føroyskt-mentar seymiuppskriftir til barnaklæðir og grýluklæðir og tekstil at seyma hesi við. Umseymaði barnapløgg og barnapakkar verða eisini til sølu í handlunum. Á henda hátt kunnu klæðir, ið annars vórðu send av landinum ella burturbeind verða endurnýtt. | 55.000 | Reyði Krossur Føroya |

| Ár | Heiti | Mál | Stuðul | Stuðulsmóttakari |
|---|---|---|---|---|
| 2020 | Kenneth Williamson fuglagrunnurin | Stovna ein ferðagrunn, sum skal gera tað gjørligt hjá útlendskum fuglagranskarum at koma til Føroya í avmarkað tíðarskeið, og føroyskum fuglagranskarum at fáa møguleika at førleikamenna seg til fuglagransking, eitt nú í ringmerking uttanlands | Kr. 50.000 | Sjúrður Hammer og Føroya Fuglafrøðifelag |
| 2020 | Avroð | Tiltak við eini langborðsmáltíð í oktober, ið kunnar um burðardygga nýtslu av lokala tilfeinginum. Eta borgarar meira avroð, kunnu vit minka um matoyðsl og lívrunnið burturkast, virða og gagnnýta fjølbroytta lokala tilfeingið og stuðla føroysku matframleiðarunum. | Kr. 25.000 | Sunniva Gudmundsdóttir Mortensen |
| 2020 | Náttúrumargfeldi fyri føroyskan ungdóm | Kveikja áhugan hjá føroyska ungdóminum fyri umhvørvinum og lívfrøðiliga margfeldinum í føroyum. Lítið og einki er kent um vøtn og tjarnir um alt Føroya land, sjálvt um hesi hava sína egnu vistskipan og lívfrøðiliga margfeldi. Stuðulin skal fíggja útgerðina, ið skal nýtast til at gera kanning av lívmargfeldinum í tjørnini við Rættará. Úrslitini verða løgd alment fram | Kr. 150.000 | Maria Chun Nielsdóttir og Glasir |
| 2020 | Grønu umhvørviskajakkirnar | Seta fokus á órudd á sjónum og brúka nakrar tímar um vikuna at taka rusk upp, sum flýtur og rekst í sjóvarmálanum inni í havnini og framvið landi í kommununi. | Kr. 40.000 | Sveinur Zachariasen og Havnar Kajakfelag |
| 2020 | Miðbýarvirksemi um fugl, náttúru og umhvørvi | Menna miðbýarvirksemið hjá feløgunum (leiga høli í miðbýnum) og at arbeiðið við at varpa ljós á lívfrøðiligt margfeldi gerst sjónligari og meiri atkomuligt hjá borgarum | Kr. 12.000 | Sanna Andrassdóttir Dahl, Føroya Náttúru- og Umhvørvisfelag og Føroya Fuglafrøðifelag |

| Ár | Heiti | Mál | Stuðul | Stuðulsmóttakari |
|---|---|---|---|---|
| 2019 | Virkin endurskapan til gagns fyri børn og ung | Seta á stovn ein skúlaurtagarð og brúka hann í undirvísingini í grunddeildini, miðdeildini og námX og læra næmingarnar um lívrunnið | Kr. 75.000 | Bjarni Beder, Frítíðarskúlin í |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | | burturkast, ið kann nýtast til sankutøð, og hvussu burturkast skal skiljast. Harumframt gera undirvísingartilfar burturúr royndunum, so at aðrir slúlar eisini kunnu fáa gagn av virkseminum | | Hoyvík og Klubb 188 |
| 2019 | NÝNÝ | Nýnýtslu av klæðum hjá Bláakrossi. Seta í verk eina seymistovu fyri at gagnnýta klæðini betur, sum Bláikrossur fær inn. | Kr. 110.000 | Bláikrossur |
| 2019 | Leykaskal | Gera royndir við at lita við leykaskali og øðrum matleivdum úr køkinum og síðani at bera úrslitini frá royndunum víðari við sjónbandi og podcast. Verkætlanin varpar ljós á bæði matoyðsl, dálkandi syntetiska klædnaliting og tað vakra í tí organiska | Kr. 36.000 | Tjóðhild Patursson o.o. |
| 2019 | Burðardygt klædnaskáp | Skriva handbók á føroyskum um persónligan stíl, sum skal geva kvinnum grundleggjandi vitan um kropp og klæðir, hvat gott er at fara í og hvat tær skulu halda seg langt frá. Hetta er eitt stig at tálma klædnanýtsluni og harvið eisini klædnaframleiðsluni, sum í dag er næstmest dálkandi ídnaður í heiminum. | Kr. 69.000 | Katrina í Geil |
| 2019 | Burðardygt umhvørvi | Menna vitanina hjá Kollafjarðarbørnum um umhvørvið við at velta røtur, epli, rabarbur, kryddurtir o.a. Allur skúlin var við í verkætlanini | Kr. 27.000 | Kollafjarðar skúli |
| 2019 | Maðkagarðurin | Gera ein maðkagarð í Nólsoy, so oyggin verður sjálvbjargin við reyðmaðkum og harvið fær betur mold | Kr. 25.000 | Edvard Skúvadal |

| Ár | Heiti | Mál | Stuðul | Stuðulsmóttakari |
|---|---|---|---|---|
| 2018 | Skúlaurtagarður – verkætlan og undirvísingartilfar | Seta á stovn ein skúlaurtagarð og brúka hann í undirvísingini í grunddeildini, miðdeildini og námX og læra næmingarnar um lívrunnið burturkast, ið kann nýtast til sankutøð og hvussu burturkast skal skiljast. Harumframt gera undirvísingartilfar burturúr royndunum, so at aðrir skúlar eisini kunnu fáa gagn av teirra arbeiði at seta á stovn ein skúlaurtagarð | Kr. 75.000 | Johann J. Petersen og Eysturskúlin |
| 2018 | Okkara grønmeti | Brúka kassarnar, sum tey hava keypt frá Býarfesti. Hvør bólkur fær ein plantukassa, sum tey skulu røkja í felag. Harumframt skulu børnini læra um ringrásina, tá ið grønmeti verður framleitt: frá at gera moldina klára | Kr. 25.000 | Gunvør Hofgaard og Lítliskúli |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | | til forspíring og fræ til at lúka, vatna og at enda heysta grønmeti og nýta tað í matgerð | | |
| 2018 | Matframleiðsla í grannaløgum | Seta upp eitt 30-40 m2 vakstrarhús við alivøksturi, har fólk í grannalagnum fáa høvi at vaksa grønmeti inni og fáa fisk frá smáframleiðsluni til matna. Praktiska virksemið skal elva til økta vitan um burðardygga matframleiðslu og um, hvussu fólk betur kunnu liva í samljóði við náttúruna við at minka um frástøðuna millum brúkara og framleiðsluna av mati | Kr. 75.000 | Jón Kragesten og Eigarafelagið í Tórsbyrgi |

| Ár | Heiti | Mál | Stuðul | Stuðulsmóttakari |
|---|---|---|---|---|
| 2017 | Listatiltøk fyri børn við fokus á náttúru | At vekja hugin hjá børnum í Margarinfabrikkini og í Nólsoy at virða og verja umhvørvið við stuttligum og læruríkum listaverkstøðum, ið fara fram í náttúruni. Framleiða stuttfilm: https://www.youtube.com/watch?v=4ZNCNJnPC0k | Kr. 24.900 | Marna Olsen |
| 2017 | Plantuskúli/lær at sáa og velta | At læra óroynd at sáa fræ og velta gerandisgrønmeti og urtir<br>Málbólkur: øll | Kr. 15.000 | Maud Wang Hansen |
| 2017 | Láni-trillibørur í Nólsoy | Minka um tørvin hjá íbúgvum og ferðafólki at hava bil við út til Nólsoyar | Kr. 20.000 | Vígdis Bjarnadóttir |
| 2017 | Dyrka ókrút | Menna vitan um umhvørvi, minka um innflutningin av matvørum.<br>Faldari, stødd og vavi og nýtsla.<br>Málbólkur: øll | Kr. 50.000 | Tjóðhild Patursson og Barbara Andreasen |
| 2017 | Endurnýtsluverkætlan | Kreativur verkstaður til børn og ung við tí endamáli at spara burturkast, endurnýta, endurskapa og endurgeva burturkast | Kr. 88.800 | Frítíðarskúlin við Botnánna og Úthangið |

| Ár | Heiti | Mál | Stuðul | Stuðulsmóttakari |
|---|---|---|---|---|
| 2016 | Vistfrøðilig kanning av músini í Nólsoy við atliti at møguligum negativum árin á | Savna vitan um føði hjá músini í Nólsoy. Kanna hvussu músin ávirkar drunnhvítastovnin. Verja av drunnhvítastovninum. | Kr. 87.500 | Sjúrður Hammer og Jens-Kjeld Jensen |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | drunnhvítastovnin – ein pilotkanning | | | |
| 2016 | Lindbergs hús/Green Student-House | Lindbergs hús skalvera karmur um teoretiska og praktiska granskan innan burðardygni og verkætlanir við endamálið at leiðbeina almenningin. Heimasíða: http://greenstudenthouse.com/lindbergshus/ Málbólkur: Lesandi og almenningur | Kr. 32.000 | Lau Øfjord Blaxekjær |
| 2016 | RINGRÁS - Rusk- kanning, innsavning og upplýsing um plastdálking í strandaumhvørvinum í miðstaðarøkinum | Kunna føroyingar um umhvørvisdálking. Gera kanningar. Kveikja broytingar í atburðarmynstrum hjá borgarum og stimbra burðardygg átøk og nýbrot innan føroyskt vinnulív, eins væl og lóggávu og umsiting. Heimasíða: https://www.facebook.com/ringrasforoyar/ | Kr. 30.500 | John Johannesen og Ingmar á Løgmansbø |
| 2016 | Býarfesti í miðbýnum | Skapa eitt alment vakstrarumhvørvi í miðbýnum. Tilsamans vóru 30 plantukassar á 4 fermetrar hvør latnir til familjur, ið sleppa at royna seg sum býarbøndur og kunnu vaksa grønmeti, frukt og blómur í egnum lítlum býarfesti. | Kr. 100.000 | Birgith Lassen |

| Ár | Heiti | Mál | Stuðul | Stuðulsmóttakari |
|---|---|---|---|---|
| 2015 | Matspilla. Frá ovmikið til nógmikið | At gera starvsfólk, foreldur, børn og køksfólk í Býlingshúsinum tilvitaði um matspillu. Hugskot um hvussu tú kann minka um matspillu. | Kr. 40.000 | Poula Eidesgaard |
| 2015 | Vitjanarstøð í kommununi | Gera »vátlaboratorium« í Sjósavninum. Kanna hvussu skúlaflokkar kundu fingið nakað burturúr uttandura feltbiologi. At økið eisini kann verða brúkt til smádjórakanningar og plantukanningar. At kontakta traðarfólk um tey hava hug at fáa vitjan, tá várið kemur. At fáa fuglafrøðifelagið at gera fuglalistar til plantagurnar í Havn. Málbólkur: Barnagarðar og skúlar | Kr. 41.000 | Finnur Lützen |
| 2015 | Føroyskur pendlaraportalur | Menna ein føroyskan pendlaraportal (heimasíðu) har fólk, ið ferðast dagliga kunnu finna aðrar pendlarar. Málbólkur: øll | Kr. 49.780 | Niels Mellemgaard o.fl. |
| 2015 | Urtir í Føroyum / Smakkið Føroyar | Samrøður við Disu sum síðan blíva ein faldari við uppskriftum og kunning. Málbólkur: øll | Kr. 31.000 | Tjóðhild Patursson o.fl. |
| 2015 | Píkasjey.fo | Heimasíðan, http://pikasjey.fo/ er talgilding, menning og miðlan av náttúruvísindaligum | Kr. 87.720 | Beinta Johannesen |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | | Málið er at skapa áhuga og tilvitan um okkara náttúru og umhvørvi. Málbólkur: Børn 7-12 ár, foreldur og lærarar | | |

| Ár | Heiti | Mál | Stuðul | Stuðulsmóttakari |
|---|---|---|---|---|
| 2014 | Verja av Drunnhvítastovninum í Nólsoy | Chip-avlesari til kettur og útruddan av útiløgukettum við kettufellum. | Kr. 5.500 | Jens-Kjeld Jensen |
| 2014 | Træ- og runnaplanting á Hoyvíkshædd | Skapa hugna hjá fólki, ið brúka fríøkini. Samstundis er hetta umhvørvisvinarligt viðvíkjandi CO2 útláti. | Kr. 25.000 | Andreas Mouritsen |
| 2014 | Tjørn á skúlaviðarlundarøkinum hjá skúlanum á Argjahamri (fyrr Argja skúla) | Fríðka og menna skúlaviðarlundina á Mullerstrøð á Argjum | Kr. 25.000 | Eyðun á Borg |
| 2014 | Gera skúlanæmingar til virknar náttúru- og umhvørvisgranskarar: Seyðabit og gróður | Vísa á at bitið er ov stórt í Føroyum. Kunna lærarалesandi og skúlanæmingar | Kr. 55.000 | Erla Olsen |
| 2014 | Grøna oyggin – kompostering av seyðatøðum | Gera skipan fyri burturbeinan av seyðatøðum frá 800 seyðum, ið standa inni um veturin í Nólsoy. Í verkætlanini vóru 15 komposteringskassar gjørdir. Fimm vóru bjálvaðir, fimm óbjálvaðir við reyðmaðki og fimm óbjálvaðir uttan reyðmaðk. Rein tøð, tøð+strá+tøð+strá+høggspønir | Kr. 39.500 | Ámundur Nolsø |
| 2014 | Lívfrøðiligt brot um kanningar av Frílendinum Boðanes-Hoydalar | Kunna fríðlendi Boðanes-Hoydalar. Menna nýtsluna av økinum við at menna samband millum brúkara og øki. (Gera 16 A5-síður). Málbólkur: øll. | Kr. 100.000 | William Simonsen og Herborg Nyholm Debess |

| Ár | Heiti | Mál | Stuðul | Stuðulsmóttakari |
|---|---|---|---|---|
| 2013 | Náttúruskúli | Gera jarðarstykkið (matr. 43) við skúlan til ein virknan og fjøltáttaðan part av skúla- og frítíðarvirkseminum | Kr. 50.000 | Skúlin við Løgmannabreyt |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 2013 | Orkustevnan | Upplýsa privathúski um møguleikar innan grøna orku og gera viðkomandi vørur og tænastur atkomiligar | Kr. 20.000 | Ólavur í Geil |
| 2013 | Sjósniglar | Innsavnan av sjósniglum o.ø til Føroya Sjósavn. Taka myndir og film av djórum og tí umhvørvi, tey liva í. Myndatilfarið skal, saman við teksti o.ø., inngang í upplýsandi tilfari í hesum sambandi, og ein fyrilestur verður gjørdur um djórini og verkætlanina. | Kr. 20.000 | Bjørki Geyti/Føroya Sjósavn |
| 2013 | Deilibil í Tórshavn | Skipan, har fólk, ið ikki brúka bill hvønn dag, kunnu deila bil | Kr. 40.000 | Drós í Ólavstovu |
| 2013 | Kornvelting í Hoyvík | Velta korn í útisavninum hjá Fornminnissavninum í Hoyvík. Ætlanin er eisini at geva næmingunum íblástur til aðrar hættir at gagnnýta kornið | Kr. 20.000 | Randi Meitil/Studenta- og HF-skeiðið í Hoydølum |
| 2013 | Vindmyllan í Nólsoy | Hita bygningar við vindorku | Kr. 100.000 | Bjarti Thomsen, Nólsoyar Orkufelag |

| Ár | Heiti | Mál | Stuðul | Stuðulsmóttakari |
|---|---|---|---|---|
| 2012 | Kanning av hvat veksur á botninum á smábátum í Havn | Hvussu fáa vit vøkstur á botninum á smábátum burtur á ein umhvørvisligan hátt og samstundis spara pengar.<br>Kanna hvat er í botnmáling og gera databløð. | Kr. 40.000 | Eivind Jacobsen SP/F Bellacentur |
| 2012 | Orkustevna | Upplýsa privathúski um møguleikar innan grøna orku og gera viðkomandi vørur og tænastur atkomiligar. | Kr. 50.000 | Ólavur í Geil |
| 2012 | "Sjósniglar og annað smákykt" – ein invertebrat-verkætlan. Framhald | Innsavnan av sjósniglum o.ø. til Føroya Sjósavn. Taka myndir og film av djórum og tí umhvørvi tey liva í. Upplýsandi tilfar gjørt og ein fyrilestur verður gjørdur um djórini og verkætlanina | Kr. 30.000 | Bjørki Geyti/Føroya Sjósavn |
| 2012 | At gera rusk um til list o.a. Endurnýta rusk o.a., sum annars vildi farið vekk, til børn og ung | Kunna seg um ReMida. Gera list og ein faldara um ReMida | Kr. 60.000 | Poula Eidesgaard og Birita Arge |
| 2012 | Ert tú til Green | Filmar og tiltøk at økja tilvitan um umhvørvið. Heimasíðan kann síggjast her: https://www.facebook.com/erttutilgreen/ | Kr. 70.000 | Sunneva Háberg Eysturstein |

| Ár | Heiti | Mál | Stuðul | Stuðulsmóttakari |
|---|---|---|---|---|
| 2011 | "Sjósniglar og annað smákykt" – ein invertebrat-verkætlan | Innsavnan av sjósniglum o.ø. til Føroya Sjósavn. Taka myndir og film av djórum og tí umhvørvi tey liva í. Hetta verður víst til vitjandi á Sjósavninum. | Kr. 93.000 | Bjørki Geyti/Føroya Sjósavn |
| 2011 | Sólorkukappkoyring á Argja skúla | Vekja áhugan hjá 8. flokki á Argja skúla fyri sólorku og varandi orku. Byggja bil, ið koyrur á sólorku. | Kr. 5.000 | Hans Fróði Jensen og Argja skúli (8. flokkur) |
| 2011 | Náttúran í Nólsoy | Tilfar til bókling, ið lýsir náttúruna í Nólsoy (skráseting: vøkstur, fuglur og ryggleys djór). Málbólkur: øll | kr. 102.000 | Føroya Náttúrugripasavn: William Simonsen, Leivur Janus Hansen og Bergur Olsen |
| 2011 | Videolag til "Lort í býin" | Økja tilvitan hjá børnum og ungum um umhvørvið. Videolagið kann síggjast her: https://www.youtube.com/watch?v=32CLHbbB6yU | Kr. 10.000 | Beinta Johannessen, STROK |
| 2011 | Faldari um skiljing av ruski í barnagørðum og frítíðarskúlum | Gera teldutøkan faldara um burturkast til Dagstovnin Býlingshúsið | Kr. 40.000 | Poula Eidesgaard |

| Ár | Heiti | Mál | Stuðul | Stuðulsmóttakari |
|---|---|---|---|---|
| 2010 | Tað sum eyga ikki sær. Umhvørvi undir vatnskorpuni – ein rundferð í og við Havnarvág | Økja um innlitið í og tilvitskuna um umhvørvið undir vatnskorpuni. Málbólkur er børn 7-12 ár<br>Framleiddur filmur kann síggjast her:<br>https://www.youtube.com/watch?v=8l1-fKoD944&feature=youtu.be | Kr. 120.000 | Ámundur Nolsø |
| 2010 | Kompostkassi at skilja matrestir og frukt í | Geva barnagarðsbørnum og starvsfólkum møguleika at skilja burturkast á stovninum | Kr. 2.700 | Býlingshúsið inni á Gøtu (Poula Eidesgaard) |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 2010 | Náttúran í Havn við atliti til lívfrøðiligt margfeldi | Lýsa við myndum og teksti náttúruna í Havn. Málbólkur: øll | kr.150.000 | William Simonsen og Herborg N. Debes |

| Ár | Heiti | Mál | Stuðul | Stuðulsmóttakari |
|---|---|---|---|---|
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |